fylgiskjal 20

***Heilsu og Innlendismálaráðið***

***Eiragarður 2***

***FO 100 Tórshavn*** ***4 juni 2018***

***Viðvíkjandi.: Natturumargfeldislógini.***

Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag takka fyri longda hoyringsfreist, og hava valt at gera hoyringsskriv í felag, og hava vit tí hesar viðmerkingar.

Tað var við stórum áhuga, at vit fóru undir at lesa lógaruppskotið, sum skal verða lógarkarmur um okkara náttúru.

Vit máttu tó skjótt ásannað, at tað var sera trupult, fyri ikki at siga ómøguligt, hjá okkum at fáa greiðu á, hvørja ítøkiliga ávirkan uppskotið fer at hava á okkara virksemi, og á samfelagið sum heild.

Tað verður sagt í viðmerkingunum, og tað sæst eisini av lógartekstinum, at uppskotnað lóggávan verður tung at umsita, soleiðis sum hon er samansett.

Vit liva í einum lítlum landi, og kenna hvønn jarðarteig, eins og vit eru fáment í tali. Vit hava ikki ráð til at samtykkja lóggávu, sum krevur stóra umsitingarliga orku, lóggávu, sum er kopiera úr okkara grannalondum, í hesum førinum úr Noreg, har fólkatalið telur milliónir.

Verandi Náttúruverndarlóg hevur sett karmarnar fyri tí náttúrufyrisiting, sum vit hava havt í næstan 40 ár. Umsiting av lógini hevur verið forankrað lokalt, og hevur tað víst seg, at lógin og umsitingin av henni, hevur verið sera væl virkandi, og hevur varveitt føroysku náttúruna, til gangs fyri verandi og komandi ættarlið.

Náttúruverndarlógin hevur verið framatrættað og hevur flutt okkum trygt fram til dagin í dag. Vit kunnu soleiðis marknaðarføra okkara náttúru sum “Unspoiled, Unexplored, Unbelievable”. Hetta sæst eisini aftur í øllum teimum afturmeldingum vit fáa frá útlendingum, sum vitja okkara óspiltu náttúru.

Verandi friðingarnevndir eru sprotnar úr okkara fólkaræðisligu skipanum, har leikfólk verða vald at taka avgerðir, og har “serfrøðin” verður brúkt sum ráðgeving, um tað er neyðugt.

Umsitingin av Náttúruverndarlógini er gott dømi um slíka fólkaræðisliga skipan, sum hevur virkað ómetaliga væl.

Vit hildu tí, at nýggja lóggávan tók útgangsstøði í verandi Náttúruverndarlóg, men so er ikki, heldur tvørtur ímótið.

Føroyingar og ikki minst tey sum hava umsitið jørðina, hava í øldir umsitið bøðin, hagan og lunnindini, á ein slíkan hátt, at atlit eru tikin til djóra og fuglalívið, so hesið, fram til dagin í dag, hava havt bestu umstøður.

Uppskotið, soleiðis sum tað er orða, setur okkum undir umsiting, og niðurgerð tað arbeiði, sum vit og ættarlið undan okkum, hava gjørt í føroysku náttúruni.

Tað harmar okkum almykið. Vit liva av og í náttúruni og hava altíð verið tey fremstu til at verja náttúruna.

Nú verður lagt upp til at nøkur, sum hava sitið á skúlabonki og á skrivstovu alt sítt lív, skulu seta dagsskránna fyri okkara arbeiði. Hesi eru bundin av, at tað almenna uppfinnur teimum størv, so tey á tann hátt, kunnu rættvísgerða eina útbúgving, sum tað bert í avmarkaðan mun er tørvur á í Føroyum.

Áhaldandi pástandir um, at tað er afturgongd í tí “lívfrøðiliga margfeldinum” (tey flestu vita ikki hvat tað er fyri nakað) og ávísingar til altjóða sáttmálar, hava nú ført til, at nevnda uppskot fyriliggur.

Fyri at venda aftur til uppskotið, so er tað so torskylt og ósamanhangandi, at tað er óskiljandi fyri tey flestu.

Nýggj hugtøk sum "vistfrøðiligar tilgongdir", "landsmargfeldi", "vistfrøðiligt funktiónsøkið", bert fyri at nevna nøkur, gera lesnaðin truplan. Hví ikki brúka vanlig føroysk orð, sum øll skilja.

Hettar sæst aftur allastaðir í uppskotinum, og byrjar í § 4, sum í besta føri er ein vánalig umseting úr norskum. Innihaldið passar ikki til føroysk viðurskiftir.
Fyri at nevna nøkur dømir afturat um nýggj orð, kann verða víst til § 30, stk. 1, nr. 1 "fjølbroytnisbreiddina", § 47, stk. 2, "verndaravgerðarmundið", § 50, stk. 3, "sambærilig fyrikoming", § 62, "umhvørvisavgerðarskrá", o.s.f.

Vit dáma heldur ikki ætlaninar í uppskotinum um at gera seg inn á ognirnar hjá øðrum. T.d. geva ásetingarnar í §§ 17, stk. 3, 18, stk. 2 og 19, stk. 2, landsstýrismanninum heimild at seta skipanir í verk á "fastogn hjá øðrum" og "ognina hjá øðrum", umframt at landsstýrismaðurin í § 20 kann áseta reglur fyri "hvussu størri økir uttangarðs skulu skipast".

Uppskotið gevur í stóran mun landsstýrismanninum fríar heimildir at skipa ymisk viðurskiftir í kunngerð. Ásetingar, sum vit ikki kenna til. Hettar er alt ov víðgongt.

Fyrivarnisreglan í uppskotinum ger, at vit ikki fáa arbeitt, tí ein "serfrøðingur", til eina og hvørja tíð, kann steðga okkara arbeiði í bø og haga.

Samanumtikið kann sigast, at vit mæla frá at fremja fyriliggjandi uppskot í verki.

Í staðin mæla vit til at landsstýrið tekur útgangsstøði í verandi Náttúruverndarlóg, og tilevnar eitt uppskot, sum passar til føroysk viðurskiftir, bæði hvat viðvíkur okkara óspiltu náttúru, umsitingarligu orku og siðbundnu fólkaræðisligu mannagongdum, og ikki minst, sum er forankrað lokalt.

***Vegna***

| | |
|---|---|
| ***Bóndafelag Føroya*** | ***Føroya Óðalsfelag*** |
| ***Sigert Patursson*** | ***Niels Th. Pedersen*** |
| ***Formaður*** | ***Formaður*** |